Lars Beksgaard, formaður í Sindri:

# Møguleikar eru at finna ol

**– Tað hevur tí eisini stóran týdning at samstarva um at loysa basaltknútin**

OLJUTING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*Myndir Jan Müller*

Mikukvøldið skipaði Oljutingið fyri limafundi á Sjómansskúlanum í Tórshavn. Evnið á limafundinum vóru ymsu verkætlaninar hjá felagsskapinum Sindri. Lars Beksgaard, formaður í Sindri, umrøddi tær verkætlanir, sum eru gjørdar ella eru ígongd. Eisini umrøddi hann framtíðar ætlanir hjá felagnum. Lars Beksgaard hevur í nógv ár verið økisleiðari hjá danska oljufelagnum DONG við ábyrgd fyri oljuleiting í føroyska, grønlendska, norska og bretska økinum. Hann hevur eisini umboðað DONG í felagskapinum Føroya Oljuídnaðarbólkur (FOÍB) í fleiri ár.

Umleið 70 fólk møttu til hetta afturvendandi heysttiltakið hjá Oljutinginum. Evnið hesaferð var eittans. Tað snúði seg um, hvussu vit loysa basaltgátuna. Arbeiðið hjá Sindri skal skiljast sum eitt íkast, supplement til tað oljufeløgini gera hvør sær fyri eitt nú at loysa basaltgátuna tvs. at kunna menna tøkni og arbeiðshættir til tess betur at kunna síggja niður gjøgnum basalt, sum finst á einum stórum pari av føroysku undirgrundini.

Hóast nógvar kanningar er støðan framvegis tann, at vit vita enn lítið um egin-leikarnar í basaltinum. Til tess at fáa ment vitanina verður arbeitt saman við lærdum háskúlum um alt Europa. Talan er um einar 23 ymsar verkætlanir, sum verða fíggjaðar av teimum 15 oljufeløgunum og Jarðfrøðissavninum. Eitt av endamálunum við hesum kanningararbeiðinum er at útvega og savna saman sokallað basis data, sum oljufeløgini so kunnu brúka í sínum víðari arbeiði. Í hesum sambandi hava boringar í bæði Lopra, Vestmanna og á Glyvursnesi havt stóran týdning fyri at fáa eina betri fatan av hesum torgreidda spurningi. Longu í 2006, tá feløgini fara at bora gjøgnum basalt, fara tey eisini at hava ágóðan av arbeiðinum hjá Sindri. Men miðjað verður móti at fáa til vega vitan, sum uppá longri sikt kann stuðla oljufeløgunum í teirra arbeiði at finna olju og gass í undirgrundini.



*Lars Beksgaard hevur góðar vónir um at oljufeløg fara at finna olju undir basaltinum*

### Hava góðar vónir

Eftir at Lars Beksgaard hevði greitt frá arbeiðinum hjá Sindri spurdu vit hann, hvørjar vónir hann hevur, nú oljufeløg fara undir at bora tveir brunnar á økjum á landgrunninum, sum eru fjald av basalti. Hann sigur, at neyvan høvdu oljufeløgini farið undir hesar stóru íløgur, um har ikki varð nakað at fara eftir. – Eg loyva mær í hvussu er gita, at oljufeløgini vóru ikki farin at bora gjøgnum basaltið, um tey ikki mettu seg hava góðar møguleikar at finna olju.

Hann er tó eisini samdur við umboð fyri Chevron, sum segði við Sosialin nú um dagarnar, at tað fara at ganga nógv ár, áðrenn basaltknúturin veruliga er loystur. Kanska upp til 10 til 20 ár. Tað veldst tó eisini um, hvussu tjúkt basaltið er. Har eru so eisini nøkur støð á landgrunninum, har tað er lættari at síggja gjøgnum basaltið.

Lars Beksgaard, sum hevur brúkt nógva orku til tess at loysa basaltknútin,

## Fakta um Sindri og Oljutingið

Sindri varð stovnsett í 2001 av landsstýrismanninum í oljumálum sum partur av leitiarbeiðinum á føroyska landgrunninum. Høvuðsendamálið við Sindri er at standa fyri felags kanningum av føroyska landgrunninum. Aðalmálini fyri hesar kanningar eru at granska í tøkni at síggja ígjøgnum basaltfláir við og kanna jarðfrøðina og kolvetnisskipanina við Føroyar. Øll oljufeløgini, ið eru virkin í Føroyum, eru limir og luttaka í verkætlanunum. Jarðfrøðissavnið er eisini umboðað.

Ein av mest avbjóðandi trupulleikunum oljufeløgini eru komin fram á í Føroyum er, hvussu man skal síggja ígjøgnum basaltfláirnar, sum fevna um ein stóran part av føroyska landgrunninum. Eisini er tað torført at bora ígjøgnum basalt, tí tað er so hart. Tí er eitt av endamálunum at finna háttir betri at skilja basaltið. Millum áhugaverdar verkætlanir, sum eru ígongd, eru SeiFaBa verkætlanin, sum savnar upplýsingar til at gera ein modell til at lesa jarðarløgini undir basaltinum. Fleiri upplýsingar um hetta fáast á heimasíðuni: www.sindri.fo

Oljutingið er ein tvørfakligur áhugafelagskapur fyri einstaklingar og feløg, sum eru áhugað í orku og kanska serliga oljumálum. Felagskapurin hevur umleið 200 limir og hevur 4 tiltøk um árið. Í nevndini eru Regin Hammer, formaður, Tummas Pauli Mýri, skrivari, Louisa A Fjallsbak, kassameistari, Pauli Einarsson og Súsanna Sørensen.



*Áhugavert var at hoyra um arbeiðið hjá Sindri*



*Teir tosa um møguleikan at finna olju næsta ár*



*Nógv fólk høvdu leitað sær á Oljutingið*